# ÓKRÚT ER IKK AT SLEPPA AV

**KONSERT** Ongantíð áður hevur nakar crowdsurfað inni í Norðurlandahúsinum. Ongantíð áður hevur nakar mushpit verið inni í Norðurlandahúsinum. Og ongantíð áður hevur ein so trimmaður og gjøgnumførdur metalbólkur verið á palli í Norðurlandahúsinum – ella í Føroyum sum heild. Útgávukonsertin hjá SIC var bæði ónd og ólekkur upp á tann ordiliga feita mátan





Rólant Waag Dam

Hann segði tað so sera gott sjálvur, Mikkjal G. Hansen, forsangari í SIC:

»Kom nú! Tað er ikki hvønn dag, at tit fáa eina metalkonsert í Føroyum. Í hvussu so er ikki av hesum kalibrinum«. Mikkjal G. Hansen hevði so púra rætt. Tónlistarliga toppaði tað í Norðurlandahúsinuim leygarkvøldið.

### Abbarnir duga enn

Sjálvir kallaðu teir seg fyri The Grand Old Dads á føroyska tungmálmspallinum. Og jú, teir vóru eitt sindur gamlir at síggja til viðhvørt – ikki minst, um tú samanbar teirra framførslu við tað, SIC leveraði aftaná.

Men teir vóru feitir, gomlu gubbarnir. Fólk hava glett seg til framførsluna frá Hatespeech síðani tað gjørdist greitt, at teir fóru at hita upp fyri SIC. Og eg trúgvi neyvan, at nakar varð vónbrotin av Hatespeech. Ikki tí, okkurt kundi siti betri enn tað gjørdi. Serliga Ozzy Osbourne lagið Mr. Crowley, har teir eisini høvdu Mikkjal G. Hansen, á pallinum, tóktist nokk so ófyrireikað.

Hugskotið var gott, at The Grand Old Dads innanfyri føroyskan tungmálm bjóðaðu nýggja ættarliðnum á pallin, men tað var sjónligt, at tónleikararnir ikki høvdu brúkt serliga nógva tíð upp á júst tann sangin.

Tað var eisini undir hesum sanginum, at stóri munurin millum eldra og yngra ættarliðið, gjørdist rættiliga sjónligur. Jákup Pauli Olsen, forsangari í Hatespeech, dugir sítt kram, tað skal eingin ivi vera um, men Mikkjal G. Hansen er í serflokki, tá tað kemur til growling. Tað er heilt, heilt ótrúligt, at hann kann blíva við so leingi, uttan at røddin tykist at vikna á nakran hátt. Imponerandi!

### Blæðudreingirnir í SIC

Jákup Pauli Olsen endurtók fleiri ferðir, hvussu fegnir teir í Hatespeech vóru, um at sleppa at hita upp fyri SIC. Hann greiddi frá, hvussu teir á Rocknátt í 1997 spældu á seinastu tungmálmskonsertini, sum hevði verið í Norðurlandahúsinum áðrenn leygarkvøldið. Tað eru 13 ár síðani.

- So tá vit vóru kul, gingu teir í SIC framvegis við blæðu, argaði hann.

Um teir í SIC tóku hetta lítla prik sum eina eyka motivatión fyri at herja á og blása Norðurlandahúsið um koll, veit eg ikki. Men tað var í øllum førum tað, teir gjørdu. So ógvusligt og kontant var tað, at eg ivist í, um tónleikararnir í SIC nakrantíð hava brúkt blæðu. Teir hava staðið uppi og pissa frá fyrsta degi av, annað ber illa til. Og var tað onkur, sum fortaldi mær, at teir allir royktu fast áðrenn teir byrjaðu í barnagarði, so hevði eg eisini trúð tí.

### Ein øgilig maskina

Figthers They Bleed eitur nýggja fløgan hjá SIC.

– Limirnir í SIC eru “fighters, og teir hava kempað og bløtt fyri sínum tónleiki, og nýggja fløgan er ein vitnisburður um, at tað hevur loyst seg tónlistarliga, skrivaði Uni L. Hansen í ummæli av fløguni í Dimmalætting í farnu viku.

Tað var júst tað, teir prógvaðu leygarkvøldið. Teir fimm í SIC eru stríðsmenn, sum á ongan hátt taka nakað í tónleikinum fyri givið. Teir stríðast fyri hvørjum einasta smáluti. Úrslitið var eitt brak av eini konsert, fulldrøn á kassan!

– Ja, ókrút er ikki so at sleppa av við, segði Mikkjal G. Hansen einaferð speiskliga undir konsertini. Eitt prik til tey, sum kanska hildu, at SIC var søga, eftir at gamli trummusláarin, av persónligum ávum, fór úr bólkinum, og at spurnartekin hevði verið sett við fíggingina av seinastu konsertferðina hjá bólkinum.

Nei, SIC er ikki so at sleppa av við. Takk og lov fyri tað! Teir fingu ein nýggjan mann í bólkin, 35 ára gamla danan Dennis Buhl, og tað er tað ikki vorðið verri av. Teir tykjast ikki at leggja í keðiliga fjølmiðlaumrøðu. Gera teir tað, so er hon øllum førum brúkt ógvuliga konstruktivt.

Tí leygarkvøldið megnaði SIC – saman við Hatespeech – at fáa fjøldina framman fyri pallin at crowdsurfa og gera mushpits. Tað er ikki sæð fyrr í Norðurlandahúsinum, og spurningurin er, um tað verður at síggja aftur. Kanska næstuferð, tá SIC spælir har.

### Norðurlandahúsið sum karmur

Eingin ivi skal vera um, at tónleikurin var í topp í Norðurlandahúsinum. Bæði tað, sum SIC spældi og sjálvt ljóðið. Hinvegin kann spurnartekin setast við, um Norðurlandahúsið er rætti karmurin um eina SIC konsert.

Hóast eini 300 fólk vóru í salinum, so tóktiskt tað ikki serliga fult. Somuleiðis er tað rættiliga høgt til loftið, sum tók nakað av tí intima.

Eitt annað, sum eisini var eitt sindur óheppið, var langi steðgurin millum Hatespeech og SIC. Gamaní, har var ein myndaframsýning við myndum, sum finska Eija Mäkivuoti hevur tikið av SIC, men tað er ikki nóg mikið til at fylla eitt tómrúm, sum tað sjálvandi er, aftaná Hatespeech hevur spælt og fjøldin bíðar eftir SIC.

Tá tað er sagt, so eiga vit eisini at endurtaka, at útgávukonsertin hjá SIC var bæði ónd og ólekkur upp á tann ordiliga feita mátan

rolant@sosialurin.fo